

# Starvsfólk

**Søkt verður eftir starvsfólki til AMA-billutir, at byrja skjótast gjørligt.**

Starvið umfatar avgreiðslu av kundum okkara, eins og goymsluavgreiðslu.

**Okkurt um teg**
Vit vænta, at tú hevur áhuga innan handilsvinnuna og kunnleika til eykalutir, eins og aðra útgerð til bilar.

At tú hevur sjálvsálit, ert fyrikomandi og opin í einum til tíðir stressaðum dagligdegi og er sinnaður at røkka ásettum málum.

**Okkurt um okkum**
Vit bjóða eitt spennandi starv í einum av føroya størstu eykalutagoymslum innan slitdeilir til flest øll bilmerkir, ið setir tænastuna í hásæti.

Arbeiðsviðurskiftini eru góð við skiftandi arbeiðstíðum innan fyri eina vanliga arbeiðsviku.

**Løn**
Lønin verður ásett sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Vagnur Johannesen á telefon 31 38 16 ella 23 16 20.

**ama**

Fútalág 1b · Postboks 3061 · FO-100 Tórshavn
Tel 31 38 16 Fax 31 35 05 · ama@ama.fo

# HÚS TIL SØLU



**Raðhús í Fjallsgøtu 42, Tórshavn til sølu**

Húsini eru í 3 hæddum, hvør uml. 45 m². Grundøkið er 144 m². Á loftinum eru 3 kømur, nýtt baðirúm og gongd. Í miðhæddini eru køkur, stova og gongd. Í kjallarahæddini eru kamar, baðirúm, vaski-/fýrrúm, gongd og durur. Arbeiðsskúrur á 15 m² við hjalli niðanfyri húsini. Niðanfyri húsini er havi við runnum og omanfyri húsini er bilpláss til 2 bilar. Húsini eru í góðum standi og hava gott útsýni. Byggiár: 1984.

**Prísuppskot: 1.850.000**

TEL. 31 80 98 / 51 80 98 · FLISAN@KALLNET.FO

**KIOSK ACTIV**

# Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir **VASKIFÓLKI** til Kiosk Activ í Hornabø og Kiosk Activ í J. Broncks gøtu at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 73 37 40.

Søkt verður eisini eftir **KRAMBAFÓLKI** til Kiosk Activ í Hornabø, Kiosk Activ í J. Broncks gøtu og Kiosk Activ í Steinatúni at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 73 37 41.

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 sovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**

Tórshavnar Musikkskúli



## Frá Tórshavnar musikkskúla

Tórshavnar musikkskúli byrjar aftur mánadagin 18. august.

Á heimasíðu skúlans www.tm.fo fæst at vita, nær og hvar næmingarnir møta fyrstu ferð.

**Tórshavnar musikkskúli**



# Bilur til sølu

Toyota Corolla 1.6 5 h. 90.000 km, árg. '99.

Nýsýnaður aug./08 – ongan kross.

Kamreimin er skift. Píkadekk á felgum og eykaútgerð. Í sera góðum standi.

Prísur: 40.000,-

**Tlf. 22 53 64**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Skrivstovustarv á Náttúruvísindadeildini

**Søkt verður eftir deildarskrivara til Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya. Starvið er fulltíðar skrivstovustarv.**

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar eru at:
- hava ábyrgd av dagliga virkseminum á deildarskrivstovuni
- hava ábyrgd av journalini
- hava dagligu fíggjarfyrisitingina á deildini
- fyrireika fundir og skriva fundarfrágreiðingar
- samskifta við studentar og lærarar
- annars alt vanligt skrivstovuarbeiði

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Paula Joensen á tel. 35 25 00 ella á teldupostadressuni hanspj@setur.fo

**Setanartreytir**
Starvið verður sett frá 1. oktober 2008 ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 3. flokkur.

**Førleiki til starvið**
Vit vænta, at tú:
- hevur skrivstovuútbúgving ella tilsvarandi royndir
- hevur góðan málkunnleika, serliga í føroyskum
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- ert ábyrgdarfull/ur og røkin
- hevur góð evni at samskifta og samstarva við onnur
- hevur góðan telduførleika
- evni at laga teg til broyttar arbeiðsumstøður

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu vera Náttúruvísindadeildini, Nóatún 3, Postrúm 2109, FO 165 Argir, í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. august 2008.

# Gullbrúdleyp

Leygardagin 6. september kunnu hjúnini Maria og Ólavur Dalsgarð á Velbastað halda gullbrúdleyp.
Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshúsinum, J.H. Schrøtersgøtu 9 í Havn frá kl. 14-19.
Tit, ið ynskja at gleða okkum á degnum við at koma, verða biðin um at siga frá á telefon 328003 fyri 27. august.

*Maria og Ólavur*